

Geilamyllan, sum Kristin í Geil, skrivar um. Tað hevur tó verið reistur ivi hvørt hetta er Sandagerðsmylnan



Húsini í Geil eru tey sum standa í ein vinkul. Her var fyrsta telefonstøð í Havn

Geil, ein tann mesti barnavinur, eg havi kent. Teir dagar, hann var í mylnuni, kom hann altíð niðan til okkum og gravaði flag, so sveittin rann, og tað var nakað ið munti.

Men tá ið skúlatíðin var endað, kom eg at kenna Geilamylnuna, tí tá var eg sjálvur mylnari. Tað vil siga, eg røkti hana um náttina, sum Poul bróður altíð helt seg undan. Hann var kvøldsvøvntur og var als ikki djarvur at ganga einsamallur í millum í myrkri. Men hetta var júst lív fyri meg, tann einsliga serlingin og bókormin.

Tá var eg góður við Geila-mylnuna. Hin flógvi, mettandi eimurin úr mjølinum, sum rann undan kvørnini, fylti hetta lítla rúmið og gjørdi tað fjálgt og hugnaligt. Lýsilampan lýsti milt og hógliga yvir bríkini, har eg sat við bókini – ikki nýttist mær brillur tá.

Góðar hevði eg stundirnar. Tá ein kornsekkur var farin í traktina, vardi tað eina góða løtu, áðrenn hon var tóm og skuldi fyllast. Meðan las eg og livdi í bókunum: Bjørnson, Oehlenslager, Heiberg, Hostrup, Marryat, Eilie, Flygare-Carlen – ja, hvat minnist eg nú aftur av øllum tí, sum tá fór inn – og út – um mín átufreka heila.

Heilt einsamallur var eg tó ikki. Ein rottufamilja vitjaði meg stútt. Hennara søga var skjótt úti. Tað sindri av korni, sum nú var malið, kundi Sandagerðsmylnan ivaleyst klára.

Men Geila-mylnan var standandi kortini. Og ein vakran dag hevði eg fingið ein lítlan son, sum eg kundi fara hagar túr við, síðan ein afturat. Vit høvdu tá altíð ein morgunmatabita í lummanum, og hann var ofta etin í Geilamylnuni.

Og nú kann væl vera, at alt hetta, sum eg her havi sagt frá, tað hevur tú so ofta hoyrt fyrr, tá vit sótu har sunnumorgnar og fingu okkum at eta. Men so ført tú at hoyra tað einaferð enn. Tey minnini – tey síðstu – eru míni bestu minni fra Geilamylnuni.

So syngur ein russisk fólkavísa:

Og nú er vísa mín úti
Mylnan hon melur ei longur.
Væl gangist tær allar dagar
Mín egni vælsignaði drongur

Gleðilig jól, kæri Eivind mín.

# Geilaættin

**Hesin sangur varð yrktur av Jukim Olsen í samband við samkomu hjá Geilaættini í 25. Juni 1999. Kona Jukim, Elsebeth, var dóttir Andrew Sloan, sonur Elspu í Geil**

Verið vælkomin við hvønn annan siga vit fró
til í sóma at heiðra tey, sum oss vóru góð.
Megnarverk Geilaættin hevur avrikað mong,
teim til heiðurs vit syngja ein song.
Har við Eystarivág
barnaheim teirra lá.
Lítli Poul spældi har,
tá sum piltur hann var,
og har síggja tú kann,
tá hann brúður sær fann.
Argja Onnu sær kjósaði hann.

Nógv at gera tey altíð høvdu Anna og Poul
vóru snimma á fótum, áðrenn undan kom sól.
Sáða korn, velta epli, trøðin var teimum góð.
Geilamyllan við Havnará stóð.
Hon ein innløga var,
havnarfólk komu har,
og Poul mól fyri tey,
so ei treyt mjøl til breyð.
Fjørðurin var so nær,
mangt eitt kók fekk hann har,
gott at bátur í neystinum var.

Alting dugdi hann at gera, tí tað navnið hekk við.
Hann var mylnari, klokkari, hann aldri bant frið.
Sjáldan maður í øllum, líkar fáar hann fann,
Anna, konan, sum skapt var til hann.
Fimm børn fingu tey.
Hjá teimum var ongin neyð.
Tí at heimið var alt,
tá ið mest um tað galt,
blíðskap settu tey hátt
mangur datt innum gátt
har øll sótu í semju og sátt.

Djóni, elstur av børnunum í Geil vóru tá,
hann var fremstur í flestum, nakað sigast má frá.
Setti ferð á at fríðka um býin á mangan hátt,
gamli skúlin er verk hans so flott.
Avhaldsmaður var hann.
Valdur til løgtingsmann.
Sangin skrivaði hann
mansbarn hvørt kenna man,
og hann boðar har frá,
hvønn tað var hann leit á,
tað er Hann, sum alt vald liggur hjá.

Dia í Geil, lítilátin, sum tann fyrsti var hann,
ið tók stigið, sum gjørdi hann til ein merkismann.
Fyri alment at vísa hvønn hans álit var á,
lat seg doypa á Eystarivág.
Mikið stríð stóðst av tí,
sum hann tá kom út í,
hann tó vikaðist ei,
men helt fram á tí leið,
tí á málið hann sá,
og hvar hjálp var at fá,
sum hans bók eisini sigur frá.

Elst av døtrum Maria Magdalena tað var,
ið á barnsferð har doyði, við tí barni hon bar.
Elspa og Isalina hesar systrarnar tvær
gott úr heimi tær bóru við sær.
Frá teim og Djóna, tit,
eru ættað øll vit,
ið her sita í dag
saman í veitslulag.
Søgan, skrivað har varð.
Øll sín part eiga har,
øllum okkum er vorðin so kær.

# Fyrsta telefonin var í Geil

Tað var í 1901, at tann stóri framburðsmaðurin Ólavur á Heygum tekur fyrsta stig til at fáa telefon í Føroyum.

Í 1905 leggur hann linjur við millumstøðum á Sundi, á Oyrareingjum og í Kvívík og Vestmanna, har hon var heima hjá Ólavi sjálvum.

Telefonin í Havn varð løgd inn í Geil, og var hetta fyrsta hús í Havn og millum fimm tey fyrstu húsini í landinum, sum høvdu telefon.

Tískil hava húsini í Geil eisini av hesi orsøk verið ein miðdepil í Havn. Tað vóru telefonstøðir altíð. Fyrsta “telefondaman” var Anna, dóttir Djóna í Geil, langomma Helga Dam Ziska, sum beint nú ger vart við seg á talvolympiadu.

Ein serligan leiklut spældi telefonin í Geil í 1907, tá ið Petur Alberg ringdi niðan í tingið og spældi lagið til tjóðsangin fyri Símun av Skarði, sum hevði yrkt sangin. Hetta var tó langt áðrenn, “Tú alfagra land mítt” gjørdist tjóðsangur.